# Kann gera fortreð fyri søluna av Eik

Ætlanin at melda Eik Banka, kann gera fortreð fyri ætlanina at selja Eik.

Tað segði Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur í tíðindunum á Rás2 í gjár.

Sosialurin skrivaði á forsíðuni mánadagin, at Eik Banki verður meldaður innan fyri tvær vikur fyri sjusk í pappírunum.

Keldur hjá Sosialinum siga, at smápartafelagið sjey fer at melda Eik, og keldurnar vilja verða við, at tað ikki er einasta felagið, sum fer at melda EIK fyri sjusk.

Stjórin í Eik, Jørn Astrup Hansen, stafestir fyri Rás2, at fyribils er bankin ikki meldaður, og eftirsum blaðið bert hevur eina ónavngivna keldu til tíðindini, fer hann at bíða við at gera viðmerkingar, til nakað meiri ítøkiligt fyriliggur.

Hinvegin heldur danski bankaserfrøðingurin, Bjarne Jensen, at hetta kann ávirka prísin fyri bankan, tá ið hann verður seldur.

Hann sigur, at tá ið bankin verður seldur og samráðingar verða um prís, fara keyparin at meta nágreiniliga um bankan.

- Síggja teir, at eitt sakarmál er á veg, fara keypararnir sjálvsagt at meta um, hvussu stórur vandin er fyri at missa penging og tað kann ávirka prísin.

- Men eru fleiri slík mál, kann tað í ringasta føri heilt forkoma søluni, tað veldst sjálvandi um, hvussu umfatandi tað er.

Kortini leggur serfrøðingurin afturat, at hansara royndir siga honum, at í allarflestu førum hava bankar viðurskiftini í ordan.

Hann heldur, at feilir kunnu henda, men vit síggja tíverri ofta dømi um, at fólk koma aftan á og royna at turka orsøkirnar til eina ólukku upp í onkran annan, í hesum føri upp í bankarnar.




**KANN ÁVIRKA**

*Í allarflestu førum hava bankar viðurskiftini í ordan, men feilir kunnu henda, sigur Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur. Hann heldur, at verður Eik Banki meldaður, kann að fáa ávirkan á søluprísin*

# Minningarhald fyri deyð børn

Minningarhald fyri deyð børn verður sunnudagin 7. novembur kl 16.00 í Dómkirkjuni, har Theodor Olsen prestur prædikar, og Sirikit Jacobsen fer at syngja. Aftan á guðtænastuna eru øll hjartaliga vælkomin til ein drekkamunn í Posthúskjallarinum.

Seinastu árini hevur eisini verið vanligt, fyrsta sunnudag í november, at skipa fyri minningarhaldi fyri børn, ið farin eru.

Tað var felagið Pinkubarnadeyði, sum tók stig til slíkt minningarhald í 1997. Undirtøkan var so mikið góð, at avgjørt var at gera hetta til ein vakran og afturvendandi sið, har øll kunnu minnast mista barn sítt, sama nær og í hvørjum sambandi barnið er mist.

- Tá ið vit missa eitt barn, missa vit ein part av okkum sjálvum. Ein part av okkara framtíð, ein part av okkara samleika. Vit náddu at knýta sterk bond til børn okkara, annaðhvørt tey vóru fødd ov tíðliga, til tíðina ella vit hava livað saman við teimum.

Minningarhaldið verður sum ein vanlig gudstænasta. Tað verður møguleiki hjá teimum, sum hava hug til tess, at tendra eitt ljós, fyri tí barnið, ið farið er.

Henda sterka kenslan av felags lagnu gevur bæði foreldrum og avvarðandi stundir til at minnast børnini, ið fingu eitt alt ov stutt lívsskeið.

- Tá ið vit tendra ljós í kirkjuni fyri børnum okkara, er tað eitt tekin um kærleika og at børn okkara enn lýsa í hjørtum foreldranna.


# SøluRásin 2010 í høllini á Skála vikuskiftið 6. og 7. nov.

**Leygardagur 6.nov**

**15.30** SøluRásin 2010 letur upp
**16.30** Angela og Hannibal
**17.30** mótaframsýning
**19.00** skemtarin Jákup Veyhe undirheldur
**20.00** mótaframsýning
**21.00** Hanus G. Johansen syngur
**21.45** Drigið millum seld atgongumerki leygardagin
**22.00** SøluRásin 2010 letur aftur

**Sunnudagur 7.nov**

**15.00** SøluRásin 2010 letur upp
**16.00** Steintór og frískar Kular Røtur
**17.00** Mótaframsýning
**17.45** Vørutombola í bygdasalinum
**19.00** Trølla Pætur, Trølla Omman og Ommudidd
**20.00** Mótaframsýning
**21.00** Eyðun og Terji spæla og syngja
**21.45** Drigið millum seld atgongumerki sunnudagin. Høvuðsvinningur (2 kekkar á 5000,- kr ) millum seld atgongumerki fyri báðar dagarnar(tvær ferðir trekt.)
**22.00** SøluRásin 2010 letur aftur.




**Básarnir á SøluRásini 2010 eru**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | 4ever | taskur, smúkkur, turrikløð, handskar og heingikoyggjur |
| 2 | Jógvan Weihe | fiskireiðsskapur, klæðir o.a |
| 3 | Maskulin | mannfólkaklæðir |
| 4 | Freya | klæðir |
| 5 | MBM | leikur og smakkiroyndir |
| 6 | Hjá Sannu | barnaklæðir |
| 7 | Reyni Service | bilar |
| 8 | M&M | dvd, cd og spøl |
| 9 | SøluRásin | tombola |
| 10 | Summardáin | blómur og gávulutir |
| 11 | Seymistovan | handarbeiði og meturvøra |
| 12 | Skortur | búnar, parykkar, andlitsmáling o.a. |
| 13 | Lætt og Leskiligt | tann nýggja bókin Lætt og Leskiligt |
| 14 | Tryggingarfelag Føroya Betri pensjón | tryggingar pensjónir |
| 15 | Gastrolux | grýtur, pannur, møtlar og skjúrt |
| 16 | Well | barnaklæðir |
| 17 | Volare Føroyar | hár og húðproduktir |
| 18 | Enjo Føroyar | reingerðaramboð |
| 19 | Sisters Accessories | undirklæðir, beltir, smúkkur o.a. |
| 20 | Borg | amboð, eltól og gólv |
| 21 | Viva | rein náttúruproduktir til húðrøkt |
| 22 | Føroya Tele | fartelefonir og teleútbúnaður |
| 23 | Madam Gaardbo | nethandil og smúkkur |
| 24 | Brá | klæðir |
| 25 | Blátt Hvítt | gávulutir og tógv. |
| 26 | Josi & Insito | klæðir |
| 27 | Auto Service | bilar |
| 28 | Maskinhandilin | amboð og máling |
| 29 | Romantique | brúkslist og gávulutir |
| 30 | Skósølan við Gøtugjógv | skógvar |
| 31 | Shop-Inn | klæðir |
| 32 | Café | |

